gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Watson og grindin - Greenpeace og oljan

## *Oddagrein*

EIN av teimum mest víðgongdu sokallaðu umhvørvismonnunum í heiminum í dag, Poul Watson frá EIA, Environmental Investigation Agency, er á veg til Føroya. Ørindi hansara og hjá umleið 50 fólkum hann hevur við sær er at forða føroyingum í at drepa grind. Tað eru nú nógv ár síðani, at sami Watson var í Føroyum. Hvat tá hendi minnast flestu okkara. Spurningurin er, hvat nú fer at henda? Hvørja ávirkan hava vit á tað, sum kann fara at henda? Hava vit gjørt okkum greitt, hvat tað vil siga, at hesin nógv umrøddi umhvørvismaðurin nú ætlar sær at forða føroyingum at reka og halda grind til?

FØROYINGAR standa helst saman sum ein maður, tá tað um slíkt ræður. Hetta er tann vanliga fatanin: at vit vilja ikki finna okkum í, at útlendingar koma til okkara og vilja forða okkum í at drepa grind. Og vandi er fyri, at kemur tað til skarpskeringar, so verður mannablóð at flóta. Tað er tí øll orsøk til at gera sær hetta greitt: hvat fara tiltøk frá Watson og móttiltøk frá okkum sjálvum at føra til? Og hvussu fer ein veruliga vanlukka at verða umrødd úti í heimi. Nú globaliseringin vindur alt meira uppá seg við eitt nú internetinum og tann grøna bylgjan uttan iva fer at vinna størri og størri frama, so er greitt, at alheimsins eygu fara at verða vend móti Føroyum í eini álvarsligari vanlukkustøðu millum Watson og føroyingar. Hetta vita vit er júst tað Watson vil. Spurningurin er, hvat vit vilja. Hóast flest okkara ikki góðtaka metodurnar og hugsunnarháttin hjá Watson og hansara fólki, so eiga vit ongantíð at vera so avgjørd, at vit ikki vilja tosa um hesi viðurskiftini. Tað verða vit eisini noydd til, nú heimurin verður minni og øll koma hvørjum øðrum meira við. So spurningurin er eisini, um ikki vit føroyingar sakliga og opið eiga at taka dialogin upp um grindina - uttan uppá forhond at hava lagt okkum eftir nakrari ávísari niðurstøðu. Onkur vil fara so langt sum at siga: lat Watson greiða frá, hvat hann hugsar og heldur. Tá avvápna vit hann. Onkur annar sigur beint tvørturímóti: at vit mugu ikki víkja ein tumma. Gevur tú einum manni sum Watson lítlafingur, so tekur hann alla hondina. Løgreglan hevur ein týðandi leiklut í hesum. Tað er umráðandi, at hon brúkar vit og skil og hevur psykologi sum eitt av amboðunum í hesum torføra máli. Tað er sjálvandi av týdningi at hava eina avgjørda støðu til slík fólk, men tað er ikki altíð, at tað er rætt at brúka vald til at fáa tað besta burturúr. Eingin ivi er um, at løgreglan fer at fáa eina torføra uppgávu, tí mugu vit eisini vóna, at hon er væl fyrireikað.

EIN onnur „hóttan“ kann koma frá einum øðrum umhvørvisfelagsskapi kanska næsta summar. Tá oljuleitingin av álvara fer at taka seg upp á opnum havi við Føroyar kunnu vit rokna við, at Greenpeace fer at forða boripallum og skipum at arbeiða. Hetta hava teir gjørt í skotskum øki, so hví ikki eisini hjá okkum. Eisini her hevur tað týdning, at føroysk løgregla og lóggáva er klár og greið. Men harfyri eiga vit at umrøða spurningin um framtíðar orkukeldur. Tí er eisini rætt í hesum førinum at vísa vælvild og taka upp dialogin um okkara felags framtíð - eisini við umhvørvisfelagsskapirnar. Harfyri nýtast vit ikki at vera samd við teir.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Tjóðskaparrøturnar stinga djúpt – hóast alt

Ein áhugaverd veljarakanning varð almannakunngjørd í seinastu viku.

Tú kanst fáa mang tog hvat burturúr eini veljarakanning, tað veldst jú um, hvat eygað vil síggja og hvønn veg tú snarar kanningini. Veljarakanningin er gjørd í sambandi við fullveldissamráðingarnar við danir og snýr seg ikki um politisku avrikini heima í Føroyum.

Kanningin sigur, at Sambands- og Javnaðarflokkurin hava politiskan meiriluta, samstundis sum 45% av fólkinum antin vil hava Annfinn Kallsberg ella Høgna Hoydal til løgmann. 27% vilja antin hava Jóannes Ejdesgaard ella Edmund Joensen til løgmann. Er skiftistíðin 4 ár, sum danir vilja, so eru føroyingar ivasamir. Soleiðis kunnu vit halda fram at snara veljarakanningini.

Tí er tað ein politisk skemtisøga, tá ið Edmund Joesen eftir seinastu samráðingarnar við danir fyri opnari mikrofon vil hava núverandi samgongu at leggja frá sær.

Í ítróttarheiminum kemur tað ikki fyri, at feløg siga upp venjarar, tá ið tað gongur væl á vølli. Tað er ikki fyrr enn úrslitini gerast heldur ivasom, at feløg royna okkurt nýtt og ganga nýggjar leiðir.

Vit hava eina góða politiska leiðslu í Føroyum í løtuni og úrslitini eru góð. Vit hava mestsum einki arbeiðsloysi, byggja nýtt vaktarskip, sandoyarferju, vágatunnil, útbyggja landssjúkrahúsið, fyrireika nýtt suðuroyarskip, hava loyst marknaðartrætuna við bretar, bankamálið er loyst, pensjónin hjá teimum eldri er hækkað munandi, oljuvinnan er í góðum hondum og búskapurin er góður.

Bert at nevna nøkur av nógvum økjum, samgongan ehvur arbeitt og arbeiðir við. Fólk flyta aftur til Føroya eftir kreppuárini og tað er ein dynamikkur mestsum allastaðni í samfelagnum.

Tí fái eg meg ikki at trúgva, at føroyingurin vil venda aftur til samgonguna 1994-1996 millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin. Ein sambandsflokk, sum fekk eina misálitisváttan í 1998 og ein Javnaðarflokk, sum rýmdi undan ábyrgd 1996. Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard vóru sum hundur og ketta og tí endaði samarbeiðið teirra millum í 1996. Gloyma fólk veruliga so skjótt?

Vit hava ein góðan løg- og varaløgmann og eina góða samgongu, sjálvt um onkur landsstýrismaður hevur traðkað eitt sindur við síðuna av í nýggju stýrisskipanarlógini. Eisini hava vit ein góðan fíggjarmálaráðharra, sum hevur skil at leggja pening til síðis, tá ið tíðirnar eru góðar.

Rom varð ikki bygdur eftir einum degi, og sjálvandi er tað nógv, sum kundi verið gjørt øðrvísi. Men Sambands- og Javnaðarflokkurin hava einki at bjóða, sum núverandi samgonga ikki megnar at útinna.

Vit skulu minnast til, at samgongan hevur tvey stór andstøðubløð sum mótpart og eina andstøðu, sum ótroyttilig hevur borðreitt við óteljandi ræðumyndum. Ja, sjálvt skemtiteknararnir eru í parti við andstøðuni.

Eisini hava vit ein Fólkaflokk sum dragnar í fullveldismálinum. Veljarakanningin sigur tíðuliga, at sambandssinnaðir fólkafloksveljarar eru riknir yvir í Sambandsflokkin.



**Poul Nyrup**

Tá ið so Poul Nyrup eisini hevur lagt seg út í føroyskan politikk og sett føroyingar upp ímóti hvørjum øðrum, so er tað einastandandi, at samgongan stendur seg so væl sum hon ger. Hetta vísir bara, hvussu djúpar tjóðskaparrøturnar stinga.

Samráðingarnar við danir eru fyri mær ógvuliga einfaldar. Tað er líkamikið fyri Poul Nyrup og hansara fólk, um tað búgva pingvinir, føroyingar, póllendingar ella fransar í Føroyum. Tey hava bert áhuga í teimum 1399 ferkilometrunum og havøkinum, sum liggja í Norðuratlantshavi.

Nyrup kann ikki gera hernaðarlandgongd í Føroyum, tí nýtir hann peningin sum einasta vápn í fullveldismálinum. Alt hetta hongur bara ikki saman moralskt, tá ið tú lesur blaðið hjá Danida, sum danska uttanríkismálaráðið gevur út. Har reypa danir sær av, hvussu nógv teir hjálpa í menningarlondum, og hvussu nógv teir arbeiða fyri, at øll fólk í heiminum fáa frælsi og millum, annað kunnu smíða sínar egnu grundlógir.

Vildi danska stjórnin føroyinginum alt tað besta, so hevði ein beinhørð skiftistíð ikki verið nýtt í samráðingunum.

Um Føroyar hava verið ein kleppur um beinini á dønum í 600 ár og danir vildu av við Føroyar, so hevði Nyrup við gleði gingið við til eina 15-20 ára skiftistíð.

Men danir vilja fyri alt í verðini ikki av við tann góða geografiska partin í kongaríkinum. Føroyar eru eitt gullnám fyri danir í altjóða høpi og tað skínur ígjøgnum á øllum hermótum. Og tað veit eisini andstøðan í Danmark.

Fullveldismálið fyri danir snýr seg ikki um pening og um hvat Nyrup kann loyva sær yvir fyri donsku veljarunum.

Fullveldismálið snýr seg um tær vøkru 18 oyggjarnar, sum ikki mugu gleppa dønum av hondum. Alt annað er sjónleikur.

Poul Nyrup hevur ringa samvitsku og ber brævið til einstaka føroyingin prógv um hetta. Nyrup veit, at hann hevur lagt ein skeivan taktikk ímóti føroyingum frá byrjan og er um at skrædna av ringari samvitsku. Fullveldismálið nívir henda annars arroganta danska politikara.

Nyrup er tíverri alt ov stoltur at viðganga mistakið, sum seinni kann koma dønum aftur um brekku.

Ein annar smidligari danskur forsætisráðharri hevði heilt vist loyst fullveldismálið á ein heilt annan hátt til gagns bæði fyri Danmark og Føroyar.

**Vagnur Michelsen**

# Donsk olmussa skal bjarga loysingarsamgonguni

Nú stendur loysingarsamgongan aftur á einum vegamóti, eftir at teirra politiski málsetningur er fullkomuliga miseydnaður. Tey seinastu rópini gella nú um allar geilar, um at danir mugu geva okkum olmussu í 15 ár, um henda loysingarsamgonga skal hóra undan.

**Vilja nú hava olmussu**

Navnið olmussa, hava somu loysingarflokkar fyri mongum árum síðani givið ríkisstuðlinum, og ikki kann sigast, at hesin stuðul altíð hevur verið so høgt í metum millum loysingarflokkarnar.

Men nú er vent í holuni, tí nú vilja teir allir hava olmussu. Men í staðin fyri at viðganga, at talan her er um tað, sum teir fyrr kallaðu olmussu, so royna teir nú at skuldseta danir fyri bæði eitt og annað.

Í hesum er einki nýtt. Men hetta bøtir bara ikki um umdømið hjá hesum loysingarflokkum. Serliga ikki tá hugsað verður um, at teir hóast alt vilja hava tætt samband við danska kongshúsið.

**Fáa bert 4 ár**

At skiftistíðin einans verður 4 ár, er ikki nakað nýtt. Nú fara tað at verða 2 ár, síðani Poul Nyrup Rasmussen lat loysingarsamgonguna vita av hesum, og síðani tá hevur hann fleiri ferðir endurtikið seg sjálvan, at soleiðis verður. Men loysingarsamgongan hevur tann trupulleika, at hon vil ikki skilja Nyrup, hóast stórur meiriluti í danska fólkatinginum, stigar forsætisráðharran í hesum máli. Har verður sostatt ikki meira at heinta hjá loysinarsamgonguni.

**Landsstýrið má frá**

Tí metir undirritaði, at nú er stundin komin til handa, tá landsstýrisins miseydnaði politiski málsetningur fær ein enda. Tað gerst einans við at vit skjótast gjørligt sleppa til atkvøðuhølini, og fólkið harvið fær sett punktum fyri hesi samgongu, sum má leggja frá sær, so vit aftur fáa eina arbeiðsføra stjórn, og fólkið kann liva trygt í landinum.

**Andras Miðskarð**

# Nú byrjar ólavsøkuvenjingin

Í kvøld, hóskvøldið klokkan 19:30 verður fyrsta fyrireikandi venjingin til ólavsøkusangin á Tinghúsvøllinum.

Venjingar verða so aftur sunnudagarnar 9., 16. og 23. juli klokkan 16., og væntiliga verður tørvur á einari seinastu venjing, sum verður mikukvøldið 26. juli kl 19:30.

Tveir verða kórleiðararnir: Sunnleif Rasmussen skal hava frumframførsluna av nýggju ólavsøkukantatuni hjá Tróndi Bogason og Dánjali Hoydal um hendi, og Ólavur Hátún tekur sær av inngangssálminum, ólavsøkusanginum »Tórshavn« hjá Pól F. Joensen og J. Waagstein og tjóðsanginum.

Øll kórhugað eru vælkomin at verða við, og ynskiligt er, at sangarar bæði av bygd og úr bý møta fjølmentir, so at ólavsøkusangurin gerst máttmikil og merkjaður hesa 1000-ára merkisstund við nýggjari kantatu.

Venjingarnar verða allar í Kommunuskúlanum í Havn, sigur Kórsamband Føroya.



# Framt lógarbrot í 23 ár

*GRINDAMÓTMÆLI. Felagsskapurin, Sea Shepherd, sum mótmælir grindadrápi, hevur søkt átta skip og skatt onnur seks síðani leiðarin, Paul Watson, fór til verka í 1977*

HØGNI MOHR

Havsins verji. Velduga vónarímyndin. Flaggskipið í sjóverjuni hjá hvalum.

Við hesum stóru orðum verður skipið, Ocean Warrior, hjá Paul Watson, umhvørvismanni, marknaðarført í lýsingartilfari hjá felagsskapinum, Sea Shepherd.

Og »velduga vónarímyndin« er á veg til Føroya.

Á brúnni stendur sjálvur Paul Watson. Watson skírir seg eldhugaðan umhvørvismann. Men hann er eisini ein maður við einum óvanliga longum lista við lógarbrotum.

**Søkti skip**

Í 1977 stovnaði Paul Watson felagsskapin, Sea Shepherd. Hann var sama árið tveittur úr Greenpeace, tí hann var farin harðliga fram móti kobbaveiðimonnum. Ta ferðina tveitti hann lurkar og skinn hjá veiðimonnunum í havi. Úrslitið var, at Greenpeace varð dømt at missa skattafyrimunir sínar í USA.

Tvey ár seinni renda hann við vilja á hvalaveiðibátin, Sierra, men skipið sakk ikki. Tískil royndi hann aftur. Í 1980 søkti hann sama skip við bumbum í portugisiska høvuðsstaðnum Lissabon.

Í 1981 søkti Paul Watson tvey skip. Hetta hendi í spanska havnarbýnum, Viga. Talan var um hvalaveiðibátarnar, Ibsa I og Ibsa II.



*Paul Watson skírir seg sjálvan umhvørvismann. Men hann er eisini virkin lógbrótari*

**Savnsmynd**

**Lívið í vága**

Flestu føroyingar minnast tá ið Watson var í Føroyum í 1986. Í Føroyum varð Watson skrivaður fyri at hava skotið við línubyrsu eftir føroyskum løgreglumonnum. Hann ætlaði at søkka gummibátin, sum teir sigldu í. Í løgreglufrágreiðingini stendur, at Watson setti lívið hjá løgreglumonnum í vanda.

Umframt at skotið varð, tveittu Watson og teir signalljós við fosfori í eftir løgregluni. Hetta fosfor er sera vandamikið, tí tað bæði logar og etir seg inn í holdið á monnum.

Eisini ætlaði Watson at seta eld á bensin, sum stoytt varð á sjógvin har sum gummibátarnir hjá sjóverjuni sigldu. Men tað miseydnaðist, hóast signalljós at kynda við vórðu tveitt fyri borð.

**Til reiðar at skjóta**

Sama árið, sum Watson gjørdi burtur úr sær í Føroyum, tóku hann og felagsskapurin ábyrgdina av at hava søkt tveir hvalaveiðibátar í Reykjavík. Eisini søgdu teir seg hava framt umfatandi herverk móti hvalastøðini uttan fyri býin.

Ein teirra, sum gjørdi arbeiðið fyri Watson, Rodney Corronado úr USA, er enn eftirlýstur sum yvirgangsmaður.

Fimm ár seinni, í 1991, gjørdi Watson seg inn á eitt meksikanskt fiskiskip. Í einum av skipum sínum hevði Watson rent á fiskiskipið ferð eftir ferð, og stórur skaði stóðst av hendingini. Undir tilburðinum vórðu fleiri av manningini umborð á skipinum hjá Watson alvápnaðir. Sama árið váttaði Watson í amerikonskum bløðum, at hann altíð var fyrireikaður at møta vandamiklum fólkum.

– Og eg eri til reiðar nýta skotvápn at ræða og verja okkum við, gjørdi hann greitt í somu bløðum.

**Lat botnventil upp**

Í 1992 legði Watson aftur eftir fiskiskipum. Hesaferð vóru trý skip úr Kosta Rika álopin av Watson og hansara stuðlum. Skotið varð eisini eftir kostarikansku manningini, og tveir mans vórðu raktir. Men skotini vóru ikki skørp, so menninir fingu bara ilt.

Sama ár royndi Watson at søkka hvala- og fiskibát í Lofoten við at lata botnventilarnar upp. Royndin miseydnaðist, men skipið fekk stóran skaða.

**»Tit háða okkum«**

Í 1993 gav Watson boð um at skjóta við kanón eftir japonskum fiskiskipi. Sama ár sigldi hann við fullari ferð móti einum teivanskum fiskiskipi meðan hann rópti gjøgnum sendaran, at »...vit sigla tykkum niður, tí tit drepa ov nógvan smáhval og tí tit háða okkum við at kalla okkum andstyggiligar...«.

Seinni royndi Watson aftur at søkka skip við at loysa botnventilin. Tað var um reppið, at fiski- og hvalaveiðiskipið, Senet, sakk undir hesi atgerð, sum var framd í Gressvik í Noreg.

**Yvirgangsfelagsskapur**

Tá ið 1993 var farið at halla, almannakunngjørdi Watson, at hann og felagsskapurin higartil høvdu søkt 8 skip og skatt onnur 6. Árið eftir varð hann tveittur úr sínum eygleiðarasessi í altjóða hvalaveiðinevndini, IWC.

Samstundis fordømdi IWC felagsskapin hjá Watson, og skírdi hann ein yvirgangsfelagsskap.

*Paul Watson:*

# Føroyingar hjálpa okkum

*GRINDAMÓTMÆLI. Á miðdegi í gjár vildi Watson vera við, at føroyingar samstarva við Sea Shepherd*

HØGNI MOHR

Mómælisherferðin móti føroyskum grindadrápi byrjar í morgin.

Paul Watson ætlar sær at leggja upp í grindadráp, men eisini at leggja fíggjarligt trýst á føroyingar við at stuðla boykotti.

Almenna endamálið við herðferðini er sambært tíðindatilfar frá Sea Shepherd at »steðga sláturítróttini um so helviti ella høgar aldur koma fyri«

Eisini verður beinleiðis gjørt greitt í hesum tíðindatilfari, at Paul Watson hevur lítla virðing fyri føroyskari mentan.

Sosialurin fekk orðið á Watson í telefon úr Lerwick í Hetlandi:

*Halló, er tað PaulWatson?*

– Ja

*Hetta er Sosialurin. Nær kemur tú til Føroya?*

– Fríggjadagin!

*Hvar fer tú at leggja skipi?*

– Onkustaðni í føroyskan sjógv?

*Fer nakar føroyingur at hjálpa tær at fremja tíni átøk?*

– Ja. Summir fara at hjálpa okkum!

*Hvussu tá?*

– Teir fara at geva okkum týdningarmiklar upplýsingar!

*Fara teir at boða tykkum frá grindaboðum?*

– Ja. Men eisini at hjálpa okkum at boykotta føroyskar fiskavørur!

*Tú vart her í 1986. Eydnaðist tann ferðin?*

– Á Ja. Vit gjørdu ein dokumentarfilm, Svartur Skurður. Hann varð vístur á Discovery og í Avstralia. Hesin filmur gjørdi, at altjóða eygað varð vent móti hesum máli!

*Fara tit at bera tykkum at á sama hátt hesaferð sum í 1986?*

– Nei, vit fara at vera nógv virknari. Vit hava størri megi og felagsskapurin er nógv størri nú, og vit hava gott samband við fólk!

*Fara tit aftur at nýta harðskap?*

– Vit nýta ikki harðskap!

*Eru tit vápnaðir?*

– Ja, vit hava kanónir. Men tær skjóta bara við sukurlátukøkum, ha, ha...

*Hava tit ongan skarpan lóður við?*

– Nei, vit nýta ikki vápn!

*Hvussu fara tit at leggja uppí grindadráp?*

– Vit fara fyrst at royna at reka grindir burtur frá oyggjunum. Tá ið vit leggja beinleiðis upp í drápið, fara vit ikki at løsta nakran!

*Men, leggja tit upp í grindadrápið, so bróta tit føroyska lóg?*

– Eg leggi einki í lógir, sum....

*Ert tú anarkistur?*

– Anarkistur...?...ehhh, nei...men eg leggi einki í lógir, ið verja órættvísi og ræðuleika. Vit eru ein altjóða felagsskapur. Ikki ein føroyskur…



*Paul Watson vil vera við, at føroyingar sjálvir fara at hjálpa honum at steðga grindadrápi*

**Savnsmynd**